# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Torleivur Mikkelsen 65



Leygardagin 13 juni fylti Torleivur Mikkelsen shippingmaður í Havn 65 ár.

Torleivur er ættaður úr Vestmanna, sonur Gunnu, f. Johannesen, og Jóannes Mikkelsen.

Hann er elstur av trimum systkjum.

Torleivur varð útbúgvin skipsførari í 1970 og sigldi í umleið 10 ár við skipum hjá A.P. Møller.

Umleið 1980 legðist hann upp á land og fór at arbeiða sum shippingmaður hjá Traderline.

Í 1990 stovnaði hann fyritøkuna Tor Shipping, sum er m.a. eitt skipsmeklaravirki og umboðar ymisk útlendsk skip.

Torleivur er giftur við Nicolinu, f. Højgaard, av Toftu m. Tey eiga trý børn, Joan, Gunnleiv og Maluna.

*-red*

## Várfest í Tilhaldinum

Í morgun gingu fingu tey á Tilhaldinum í Tórsgøtu í Havn óvæntaða vitjan og ein gávukekk upp á 47.800 krónur frá teimum sum skipaðu fyri Várfestini, sum var í Havn sunnudagin 17. mai.

Várfestin var eitt tiltak í miðbýnum í Havn við tónleiki, drama, og dansiframførslu, har bíbilski boðskapurin varð boðaður á ein øðrvísi hátt, enn vit eru von við í Føroyum. Tiltakið var skipað av fleiri samkomum og kirkjum í Havn.

Á Várfestini var ein t.d. ein uppboðssøla av málningum, sum fleiri føroysk listafólk høvdu málað og málaðu á Vaglinum, meðan Várfestin var. Vegna tað hjálpsemi og vælvild sum tiltakið fekk frá Tórshavnar kommunu, avráddu fyrireikararnir at avlopið av tiltakinum skuldu fara til okkurt vælgerandi endamál í kommununi, og tað bleiv so Tilhaldið í Tórsgøtu.

Vegna fyrireikararnar av Várfestini segði Erling í Liða m.a. "Vit samdust um, at yvirskotið skuldi fara til Tilhaldið. Tað er tíverri oftani soleiðis, at tey gomlu verða gloymd. Vit høvdu eisini hoyrt um leiðaran, Wanju Petersen, sum er ein sonn eldsál. Hvat hevði Tilhaldið verið uttan Wanju? So hendan gávan skal eisini takast sum eitt herðaklapp til Wanju fyri tað ótroyttiliga arbeiði, sum hon ger í Tilhaldinum".

Eftir at kekkurin varð handaður, takkaðu tey trý: Wanja Petersen, vegna Tilhaldið, Heðin Mortensen, borgarstjóri, vegna Tórshavnar kommunu, og Jákup Lindenskov, formaður í nevndini fyri Tilhaldið, fyri stórfingnu peningagávuna.

*-red*




*Wanja Petersen leiðari í Tilhaldinum við kekkinum frá Várfestini 2009*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## B68 dagur á Svangaskarði

B68 dagur verður á Svangaskarði leygardagin 20. juni við nógvum ymiskum tiltøkum. Í hesum sambandi verður grasvøllurin á Svangaskarði tøkur til campingpláss alt vikuskiftið.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum, byrjar B68 dagin kl. 11.30. Áðrenn bygda- og stuðulsrenningina kl. 12.30 verður møguleiki at fáa blóðtrýstið mált av fólki frá hjartafelagnum. Upphiting verður á graslíkisvøllinum við tónleiki og upphitingarcoach.

Stóra teltið hjá Bátafelagnum verður karmur um flestu av tiltøkunum. Seinnapartin frá kl. 16 verður B68-búffur við chips og grønmeti í hugnaliga umhvørvinum í teltinum við livandi tónleiki afturvið. Tónleikur, mattombola, grill, kappingar og spøl fyri børnini verða nøkur av tiltøkunum hendan dagin.

Landskappingardystur í fótbólti í 1. deild verður millum B68 og TB kl. 17, og kl. 20 verður ein dystur millum gullliðið hjá B68 frá 1984 og NSÍ liðið frá 1984.

Nógvur sangur og tónleikur verður á eisini skránni. Kl. 16 verður tónleikur við Johan Magnus Kristiansson Olsen og hálvan tíma seinni við Trianity. Tabor-kórið og Nebo-kórið syngja ávikavist kl. 19 og 19.30, og kl. 22 verður Syngið við tiltak við undirspæli.

B68 dagurin endar við Contry dansi við Halli Joensen og orkestri frá kl. 23.00.

Sum nakað nýtt, verður grasvøllurin á Svangaskarði tøkur til campingpláss alt vikuskiftið.

Kostnaðurin fyri campingpláss er kr. 120 um samdøgrið, og kostnaðurin fyri teltpláss er kr. 75 um samdøgrið. Tilmelding til campingpláss kann gerast við at ringja til Haldor Gaardbo tlf. 217760 ella 447760.

Skráin fyri B68 dagin sæst á www.b68.fo.

*-red*



*Hans Pauli Strøm og Harry Hansen á B68-degnum í fjør*

## Tøkk



Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan og fjølbroyttan hátt sýndu okkum samkenslu og troyst í sakninum, tá okkara elskaða fitta sólstrála

**Jona**
fór heim til Jesuspápa.

Vit takka fyri tað størsta, tað minsta, tað sjónliga og tað ósjónliga, tað nærverandi og tað fráverandi.
Takk fyri øll tykkum, sum vóru um Jonu og okkum fýra við orðum, hugsanum og við verkum, gjøgnum lív hennara, sjúku hennara og gjøgnum burturferð hennara.
Vit takka sjúkrahúsverkinum bæði í Føroyum og í Danmark fyri umsorgan og hjálp – ein serlig tøkk til tykkum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Vit takka umlættingarheiminum Dáanum fyri umsorgan og kærleika av høgum stað.
Vit takka stuðlum og skúlanum fyri ómetaligan kærleika og tol.
Vit takka øllum, sum heiðraðu minnið um Jonu við at stuðla minningargrunn hennara, sum er fyri børn og ung við breki.
Mátti Hann, sum sær alt, hoyrir alt og skilir alt;
Harrin Gud, Tann fyrsti og tann síðsti,
vælsigna tykkum øll somul.

*Signingin, dýrdin, vísdómurin, tøkkin, heiðurin, mátturin og kraftin hoyrir Gudi okkara til, í aldur og allar ævir!*

**Anna Maria, Rógvi, Rebecca og Karl**

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 17.juni. verður Poula Christiansen, Kollafjørður 80 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum í Kollafirði, Mikudagin 17.juni. frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lesið Sosialin

**Dagurin**
**16. juni. Tycho.** Í fjórðu ella fimtu øld var hann biskupur í Amatus á Kypros.

*Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008*